

www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 03 - 2013

# Suðurkorea nærri Arktiska Ráðnum

Suðurkorea livir upp til tess skyldur í sambandi við búskap, umhvørvi og trygd fyri at gerast partur av Arktiska Ráðnum, og umsóknin frá Suðurkorea fyri at gerast fastur eygleiðari fær týðandi stuðul úr Svøríki, sum hevur formansskapin í Ráðnum sigur svenski sendiharrin í Seoul við tíðindastovuna Yonhap. Eysturasiatiska landið roynir at skunda undir avgerðina at gerast partur av tí 8 landa stóra ráðnum, sum fevnir um fimm Norðurlond umframt Russland, Kanada og USA, nú bæði umhvørvis- og búskaparlig áhugamál fáa størri raðfesting í arktiska økinum. Ráðið hevur ráðharrafund 15. mai í Svøríki, har tað skal taka støðu til, um tað vil loyva Suðurkorea og øðrum tjóðum eitt nú Kina og Japan, at gerast partur av ráðnum sum fastir eygleiðarar. Kanada, sum í næstum yvirtekur formansskapin, hevur boðað frá, at Patrick Borbey verður nýggjur leiðari fyri kanadisku umboðanina.